


**Nr. 1** *7. januar 2024* **84. árg.**

# Deyður í 400 ár
## – men kroppurin er framvegis heilur

Í gjárkvøldið (10.06.2022) sat eg og lurtaði eftir Visjon Norge. Steinar Harila var gestur. Hann segði, at hann hevði verið inni í kirkjuni, har líkið av tí Harrans tænaranum Nikolaus, lá í einari glaskistu.

Eg mintist væl, at eg einaferð hevði lisið eina grein um henda sjáldsama mann. Greinina fann eg í „Tro & Fakta."

**„Tro & Fakta" Nr. 11 í 1987, og endurgevi eg hana her:**
Umleið 30 túsund fólk vitja á hvørjum ári ta elligomlu kirkjuna í Laurilla uttan fyri býin Kemi – uppi í norður Finnlandi. Tey hyggja undrandi at jarðisku leivdunum av tí Harrans tænaranum Nikolaus Matthiae Rungius, sum livdi og virkaði har frá 1616 til deyða sín í 1629.

Blaðstjórin á „Tro & Fakta" greiðir soleiðis frá: „Vit sóu alt likam hansara – frá høvdinum og vinstra armi, sum lá tvørtur um bringuna – og oman til føturnar – við fleiri óskalaðum smálutum."

Ein savnsvørður, sum fylgdi okkum, svaraði spurningum: Fólk vita, at grøvin hjá honum varð latin upp – um ikki fyrr, so í hvussu so er í 1704, og likamið var heilt, men kistan var rotnað, fúnað. Hetta hevur gjøgnum árini endurtikið seg fleiri ferðir. Hvørja ferð, at hann varð lagdur í nýggja kistu, endaði tað við, at hon rotnaði.

Savnsvørðurin segði eisini, at likamið fleiri ferðir gjøgnum árini var vísindaliga kannað. Men úrslitið gjørdist altíð hitt sama: Eingi kemisk evni vóru at finna.

At likamið á hesum manni enn er heilt, er eitt gátuført fyribrigdi – umtalað og viðurkent bæði av leikum og lærdum. Men gamlar frásagnir koma við hesi frágreiðing:

Nikolaus Rungius var helst hin fyrsti Harrans tænarin har á leiðini, sum kvetti við pávakirkjuna. Hann var ein bønarinnar maður og boðaði Orðið í anda og kraft. Í einari talu við eitt serligt høvi segði hann: „Um orð míni ikki eru sonn, skal kroppur mín fúna og molna sundur; men um tey eru sonn, skal hann ikki molna.“

„Minni um hin rættvísa verður signað, men navn gudleysra rotnar burtur.“ Orðt. 10,7 V.D.

„Men eg veit, at loysnari mín livir, og sum hin síðsti skal Hann stíga fram á dustinum.“ Job 19,25 V.D.

„Við trúgv bar Ábel fram fyri Gud betri offur enn Káin…, og við henni talar hann enn, tó at hann er deyður.“ Hebr. 11,4

*Effie Campbell* umsetti.

# Liggur tú í andvekri?

Fyri mongum árum síðani var tað ein ríkmaður yviri í Amerika. Hann var ómetaliga ríkur. Hann hevði lænt einum manni 1.000 kr. Tað vóru sanniliga nógvir pengar tá á døgum. So brádliga gjørdist hann varur við, at hann fór ongantíð at fáa hasar pengarnar aftur, tí tað var hin maðurin ikki førur fyri. Eina heila nátt lá hann í andvekri og var so argur inn á seg sjálvan, at hann kundi havt verið so býttur.

Pengar eru ikki tað týdningarmesta her á jørð. Eigur tú børn, so skuldi ein hildið, at tú gjørdi alt fyri at peika teimum á Jesus og vísa teimum vegin til Himmalin? Hevur tú ligið í andvekri og rópt á Jesus at grípa inn og frelsa børn tíni, ella hevur tú bara ligið í andvekri vegna pengaspekulatiónir?

Skriftin sigur soleiðis: „Statt upp og vena á nátt í byrjanini á hvørji náttarvøku, oys út títt hjarta sum vatn fyri ásjón Harrans, hevja til hans hendur fyri lív barna tína, sum máttleys níga av hungri á hvørjum vegamóti.“ Harml. 2,19.

Vit mugu brúka tíðina skilagott, vit vita ikki, hvussu nógva tíð vit hava eftir. Men Harrin er trúfastur, og Hann svíkur ikki lyfti síni. Okkara partur er at vera áhaldandi í bønini.

*Effie Campbell.*

# Gud møtti Khadiju gjøgnum dreymar

Hjúnini Ahmed og Khadija komu bæði til trúgv á Jesus í Danmark gjøgnum miðlarnar. Khadija, sum var virkin muslimur, fór undir at kanna ta kristnu og muslimsku trúnna á miðlunum. Gud fór at tala til hennara gjøgnum dreymar. Hon stríddist ímóti og vísti dreymarnar frá sær í eitt tíðarskeið.

Í einum dreymi var hon í tí djúpasta myrkri, í deyðsríkinum. Hon sá eina lýsandi hond, sum rætti seg niður til hennara fyri at lyfta hana út úr myrkrinum. – Hon vaknaði og tendraði sjónvarpið. Ein arabiskur kristin prestur trein fram á skíggjan og segði: „Tú vart í myrkrinum, tú vart deyð, men Gud hevur gjørt teg livandi. Hann hevur rætt hond sína út og lyft teg út úr myrkrinum og inn í sítt undurfulla ríki." Tá skilti Khadija, at Gud sanniliga var har fyri at hjálpa henni.

Í einum øðrum dreymi sá hon eitt ljós og eina lítla hurð, sum var vegurin inn í himmalin. Ein rødd segði: „Sig: Jesus úr Nasaret, so skal hurðin latast upp fyri tær." Eg segði Jesu navn, og eg slapp inn. Her møtti eg einum eingli, sum segði: „Tú skalt fáa eitt nýtt navn." Eg slapp at síggja himmalin, og so vaknaði eg. Nakað seinni skilti eg, at Jesus er dyrnar, og at tey, sum hoyra rødd hansara, sleppa inn gjøgnum dyrnar. Tá gjørdi eg av ongantíð at sleppa Jesusi, men fylgja honum!"

*Dansk Europamission – Effie Campbell* umsetti.

# Lat teg ikki níva av mistøkum úr fortíðini Náði Guds er nýggj á hvørjum morgni

*Harmaljóð 3,23*

Tá ið tað stendur í Bíbliuni, at náði Guds er nýggj hvønn morgun, so er tað eitt framúrskarandi lyfti um hetta, at hvør dagur er ein nýggj byrjan. Eins og vit ikki skulu stúra fyri degnum í morgin, somuleiðis skulu vit ikki stúra fyri avleiðingunum av tí, sum vit gjørdu skeivt í gjár. Gud gevur tær eina nýggja byrjan hvønn dag, og Hann kann eisini fáa aftur í rættlag teir skeivleikarnar, sum tú gjørdi í gjár.

Er tað okkurt í fortíðini, sum tyngir teg, játta so tíni mistøk fyri Gudi, og Hann vil fyrigeva tær. Tað var tí, Jesus doyði á krossinum. Tað var tí, at tú kundi fáa fyrigeving fyri alt tað, tú hevur gjørt skeivt. Um tú takkar Gudi hvønn dag fyri tað,

sum Jesus gjørdi fyri teg, so tekur tú ímóti Guds náði, og tú kanst vera sum føddur av nýggjum hvønn morgun. Er tað ikki bara undurfult, at Gud kennir okkara veikleikar og misbrot, og Hann hevur funnið eina loysn fyri okkum?

„Náði Guds er nýggj á hvørjum morgni.“ Harmaljóð 3,23.

*„Præsten og Psykologen“ – Effie Campbell* umsetti.

## Orð títt er sannleiki

Mitt í einari ørvitisligari og ráðaleysari verð, har serfrøðingar dagliga koma við skiftandi meiningum, eru vit Jesus- og Bíbliutrúgvandi ríkt vælsignað. Í fýra orðum vita vit, hvar sannleikin er. Jesus biður til sín og okkara himmalska Faðir: „ORÐ TÍTT ER SANNLEIKI.“ Jóhs. 17,17.

Tann, sum boyggir seg undir hesi fýra orð, boyggir seg fyri Kristusi, tí Hann er Orðið og Sannleikin.

Ólukkan hjá okkara ættarliði er, at ein stórur partur av fólkinum kennir ikki Sannleikan og leitar heldur ikki eftir honum. Sannleikin er fyri tey flestu, at tað, sum EG haldi vera satt, tað er satt.

Men Jesus skar ígjøgnum allar okkara meiningar og tankar og segði og sigur: „Himmalski Faðir! Títt Orð er Sannleiki.“

*Effie Campbell* umsetti.

---

# Sunnudagsblaðið
## ynskir øllum eitt
## av Harranum signað nýggjár

### SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 7. jan. | **Tekstur:** | Joh. 20,30-31; 21,25 og Sl. 119,9+26b+27+105+130 | **Bíbliuorð:** | Sl. 119,105 |
| 14. jan. | **Tekstur:** | Róm. 15,4 og 2 Tim. 3,16-17 og Jóh. 3,16 | **Bíbliuorð:** | Luk. 21,33 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 2** ***21. januar 2024*** **84. árg.**

# Sáa bara sáðið

*„... gleðiboðskapurin ... er til frelsu fyri hvønn tann, sum trýr." Róm. 1,16.*

Ein prestur sigur frá, hvussu hann einaferð stóð á King's Cross í Sydney í Avstralia, tá ið ein lurvutur maður togaði í ermuna hjá honum og spurdi: „Hvar fert tú at vera í ævinleikanum, um tú doyrt í nátt?" Hesin spurningur helt á at plága hann, til hann at enda gav Kristusi lív sítt.

Seinni vitnaði ein kona í hansara kirkju um eina hending lík hesari á júst sama staði. Hendingin hevði eisini fingið hana at koma til Jesusar.

Fleiri ár seinni var prestur á vitjan í hesum sama øki, og hann fór yvir at vita, um hann mundi síggja henda løgna mannin. Púra rætt, sum hann stóð og hugdi kring seg eftir øllum andlitunum, nærkaðist ein gamal maður. Áðrenn gamli maðurin fekk orðið fyri seg, segði prestur: „Nú fert tú at spyrja meg, hvar eg fari at vera í ævinleikanum, um eg doyggi í nátt, ikki so?"

Bilsin spurdi tann gamli maðurin, hvussu hann kundi vita tað. Prestur fór undir at siga honum um øll tey menniskjuni, sum vóru komin at kenna Kristus av teirri orsøk, at hann hevði sett henda spurningin.

Ógvuliga rørdur segði hesin gamli maðurin: „Eg var alkoholikari, áðrenn eg vendi um til Jesus. Eg havi onga útbúgving, eg dugi ikki at tala, og tað einasta, sum eg dugdi at finna uppá, var at spáka aftur og fram og seta fólki henda spurningin. Nú havi eg spurt soleiðis í átta ár, og ikki fyrr enn

í dag fái eg greiðu á, at hetta hevur gjørt mun og hevur havt týdning."

Summi fólk koma til Kristus, tá ið hann kallar fyrstu ferð; men tey okkara millum, sum eru meira tornom, ganga ofta ein longri umveg heim. Tað er ikki tín lutur at broyta menniskju, tú skalt bara geva teimum tað lívgevandi orðið og lata Gud broyta tey. Jesus segði: „Og tá ið eg verði lyftur upp frá jørðini, skal eg draga allar til mín." Jóh. 12,32. Tú skalt bara sáa sáðið og lata Harra akurskurðarins gera restina!

„*... et Ord til Dagen*" – *Effie Campbell* umsetti.

# Gleð teg til himmalin

*„Vit hava ein bygning frá Gudi ...*
*ævigt í himnunum." 2. Kor. 5,1.*

Alice Gray skrivar: „Laurel visti, at hon skuldi doyggja. Sum vikurnar gingu, talaðu vit ofta um himmalin. Tað torførasta var at ímynda sær nakað, sum vit ongantíð høvdu sæð. So kom eg at hugsa um hesa frásøgnina:

Ein ung genta hevði verið blind, síðani hon varð borin í heim. Tá ið hon var tólv ár, vóru læknarnir førir fyri at gera eina nýggja skurðviðgerð, sum ikki var roynd áður. Henda skurðviðgerð fór at geva henni sjónina aftur. Men úrslitið fingu tey ikki at vita fyrr enn um fleiri dagar.

Eftir at bindini vóru tikin av, máttu eyguni verjast móti ljósinum. So sat hon og bíðaði í myrkri. Mamman brúkti nógvar tímar at svara spurningum frá dóttrini, um hvussu alt sá út, og hvat ið hon kundi vænta sær. At enda upprann løtan, tá ið eyguni í gentuni kundu tola so mikið av ljósi, at hon slapp at hyggja út gjøgnum vindeygað.

Leingi stóð hon uttan at mæla orð. Tað lýsti fyri degi. Hetta var ein vakur dagur. Bleyt, hvít skýggj prýddu bláa himmalin. Blómur lógu allastaðni á moldini sum ljósareyður kavi, og í veika lotinum sá hon tey blómandi kirsuberjatrøini. Gul krokus vuksu í grasinum fram við gøtuni. Tá ið gentan vendi sær móti mammu síni, runnu tárini stríð eftir kjálkum hennara, og hon segði: „Á mamma, hví segði tú mær ikki, at tað var so vakurt?"

Eg segði vinkonu míni hesa frásøgn, og tárini stóðu í mínum eygum, tá ið eg segði: „Laurel, beint nú sita vit í myrkri, men áðrenn langt um líður, fert tú at seta Gudi sama spurning."

Himmalin er veruligur. Hann er meira veruligur enn nakað stað, har tú nakrantíð hevur verið, og hann er nógv vakrari. Paulus kallar tað „ólíka nógv betri“, sí Fil. 1,23. Tá ið tú kemur til himmals, fert tú at taka í hondina á Jesusi og spyrja: „Hví segði tú mær ikki, at tað fór at vera so vakurt?“

*„ ... et Ord til Dagen“ – Effie Campbell* umsetti.

# Tey hittust

Fyri árum síðani herjaði hin sonevnda spanskasjúkan eisini her í Noregi. Á teimum døgum høvdu vit ein skyldmann, sum ferðaðist um og boðaði Guds orð. Hann var væl kendur í mongum heimi – serliga í bygdunum á Eysturlandinum.

Í einum av hesum heimum, sum hann ofta vitjaði, gjørdist hann serliga góður vinur við eina smágentu, sum var fimm ára gomul. Latið okkum kalla hana Tulla. Hann gjørdist serliga góður við hana. Tí var gleðin eisini stór hvørja ferð, hann kom, og líka syrgiligt var tað, tá ið hann noyddist at fara.

Sum tíðin gekk, varð hesin Harrans tænari eisini smittaður av hesi umfarsótt. Hann hevði gingið út og inn millum tey sjúku og doyggjandi, og at enda legðist hann á songina.

Hann varð liggjandi á einum staði, nógvar fjórðingar haðani hin yndisliga smágentan búði. Annars var tað eisini langt síðani, at hann hevði verið á gátt har, so hann visti einki um, at hon eisini var vorðin sjúk. Hann hevði sjálvandi meir enn nóg mikið at stríðast við sína egnu sjúku um hesa tíðina.

Beint áðrenn hesin maður steig inn í ævinleikan, hendi nakað serligt. Tey, sum stóðu uttan um hann, greiddu seinni frá tí: Við eitt strálaði andlit hansara, og við heilt týðiligari rødd segði hann: „Nei, kemur tú eisini, Tulla! Kom, lat meg leiða teg, so skulu vit bæði ganga saman inn í himmalin, tú og eg!“

Seinni varð staðfest, at Tulla doyði á somu tíð sum hann.

„Tað, sum eyga ikki sá, og oyra ikki hoyrdi, og ikki kom upp í mannahjarta, tað sum Gud hevur tilbúgvið teimum, sum elska hann.“ 1. Kor. 2,9.

„Tann, sum trýr á meg, skal liva, um hann so doyr.“ Jóh. 11,25.

*Effie Campbell* umsetti.

# Ein hálvur sannleiki

*„Um vit játta syndum okkara, tá er hann trúfastur og rættvísur, so at hann fyrigevur okkum syndirnar og reinsar okkum frá allari órættvísi.“ 1. Jóh. 1,9.*

Allir trupulleikar menniskjans hava sín uppruna í syndini. Tí er syndin ein so stórur meinbogi. Men Gud visti ráð. Hann læt son sín líða og doyggja fyri okkara skuld. Hetta var honum ein dýr loysn.

„Jesus er so góður. Hann fyrigevur alla synd,“ siga menniskju. Hatta er bara ein hálvur sannleiki, tí Jesus fyrigevur bara ta syndina, sum verður játtað. Skriftin sigur tað soleiðis: „**Um vit játta** syndum okkara, **tá** er hann trúfastur og rættvísur, so at hann fyrigevur okkum syndirnar og reinsar okkum frá allari órættvísi.“ 1. Jóh. 1,9. Treytin fyri at fáa syndina fyrigivna er altso at játta syndina.

*Effie Campbell.*

# Tungan kann oyðileggja alt lív okkara

Sagt verður, at tey djúpastu sár koma ikki av svørðum, men av orðum. Trýrt tú ikki hesum, hygg so at øllum teimum særdu fólkunum, sum ganga rundan um teg! Stríðist tú eisini at vinna á nøkrum pínufullum orðum frá einum kensluleysum pápa ella mammu, einum lærara, einum hjúnafelaga ella stjóra? Ella uppaftur verri: frá kristnum, sum ikki halda, at Guds orð um slatur hevur nakað við **tey** at gera? Ta syndina, sum slatur er (ja, tað er ein synd!), tekur Gud so álvarsliga, at hann brúkar ein heilan kapittul í Bíbliuni at tala um hana. Um vit regluliga lósu triðja kapittul hjá Jákupi, høvdu vit kanska verið meira varin og gjøgnumhugsað okkara orðaval, áðrenn vit lótu munnin upp.

*Effie Campbell* umsetti.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 21. jan. | **Tekstur:** | Matt. 3,3/Jes. 40,3 og Matt. 4,10/5 Mós. 6,13 | **Bíbliuorð:** | Hebr. 13,8 |
| 28. jan. | **Tekstur:** | Luk. 2,41-52 | **Bíbliuorð:** | Matt. 2,49b |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74